# tíðindablaðið sosialurin

Nr. 242 Leygardagur 14. desember 1996 70. árgangur Krónur 7,00



## Havnargentur á ferð í Vietnam

Sosialurin hitti tríggjar havnargentur í Singapore. Tær hava verið á ferð í Vietnam. – Vietnam er annað enn kríggj og kommunisma, siga tær.

## Vilja bora eftir olju kring Suðuroynna

Áhugin fyri at leita eftir olju á føroyskum øki er ovurstórur. 23 oljufeløg halda ein stóran part av føroyska økinum vera áhugaverdan. Talan er fyrst og fremst um økið við Hetlandsrennuna, men eisini inni á landgrunninum eystan, sunnan og vestan fyri Føroyar er stórur áhugi.




Síða 8

## Tann tímalønti verður fyri missi

– Tann vanligi tímaløntu lønmóttakarin - við eini sethúsaskuld upp á einar 700.000 krónur má við nýggju skattaskipanini veita landskassanum 2.000 kr um mánaðin í kredittí. Tað hava fólk ikki ráð til, sigur Jóannes Eidesgaard

Síða 4

VØRU-
KOYRING
FLYTING
ÚR FØROYUM
TIL FØROYA
Goymsla &
Flytikassar
TILBOÐ verða
givin
Lagaligir prísir!
Pf. HP trading
TRANSPORT
Tlf. 17272
Fax 15009

## Teir vóru grótharðir við hvønn annan



**Jóannes Dalsgaard, landsskjalavørður, hevur skrivað megnarbók um arbeiðararørsluna á Tvøroyri**

Síða 13-15




25" GRUNDIG
kr. 10.650
28" NOKIA
kr. 10.950
TILBOÐ
100 Hz SJÓNVØRP
RADIO HANDILIN
Handilskj., Box 119 · Havn
Tlf. 18277 Fax 18377



Quality Street
– karamellurnar, ið hoyra jólunum til
1,8 kg fyri EINANS 169,-



Bakaríið mylnan



Koyring til jarðarferð



Vit hava líkvognar til leigu. Koyra um alt landið
P/F Bilútleigan á Heygnum Mikla
Tlf. 19400 - 86190 - 84090

*Løgmaður um tilmæli til oljuleitingarøki við Føroyar*

# -Eg eri ovurfegin

*-Eg eri ovurfegin um tann stóra áhugan, sum oljufeløgini vísa tí føroyska økinum, og tilmælini frá feløgunum er ein týðulig ábending um, at vónirnar til at finna olju og gass ikki bert eru til økini framvið Hetlandsrennuni men harafturímóti á einum stórum øki á Føroyaleiðini. Hetta sigur Edmund Joensen, løgmaður, nú Oljuráðleggingarnevndin hevur almannakunngjørt eitt fyri Føroyar og umheimin sera áhugavert kort við teimum teigunum, ið oljufeløgini meta sum sera áhugaverdar.*



*Løgmaður Edmund Joensen er ovurfegin um nýggja kortið*

JAN MÜLLER

Ovurstórur áhugi er millum oljufeløg at sleppa at bora eftir olju við Føroyar. Hetta kanst tú m.a. lesa úr kortinum við áhugaverdum teigum, sum Oljufyrisitingin nú hevur almannakunngjørt.

Óttin fyri, at bert økini við Hetlandsrennuna, sum bretska stjórnin ger krav uppá, hava áhugan hjá oljufeløgunum, verður við hesum kortinum bráddliga gjørdur til einkis - ella í hvussu er munandi minkaður.

5. august var freistin úti hjá oljufeløgunum at koma við tilmælum um, hvørjar teigar (blokkar) kring Føroyar, tey ynskja tiknar uppí tá fyrsta útbjóðingarumfarið til oljuleitingar verður sett í verk, væntandi fram undir árslok 1997.

Ikki færri enn 23 oljufeløg løtu inn 13 ymisk tilmæli. Hesi fevna um 108 heilar teigar og 26 teigapartar.

Av hesum eru 43 heilir teigar og 13 teigapartar mettir sum „sera áhugaverdir" av einum ella fleiri feløgum.

**Ikki bara Hetlandsrennan**

Oljuráðleggingarnevndin vísir í tíðindaskrivi á, at tilmælini fevna ikki bert um økið fram við Hetlandsrennuni, men eisini um teigar uppi á landgrunninum eystan fyri Føroyar, á Munkagrunninum og fram við kantinum báðumegin, partar av Bankarennuni og heilt út á Bankaryggin í eini útsynning úr Føroyum.

Oljuráðleggingarnevndin sigur seg vera ógvuliga fegna um stóru undirtøkuna frá oljufeløgunum. Saman við metingunum hjá okkara egnu jarðfrøðingum fara tilmælini at viga tungt, tá øki skulu veljast til útbjóðingar í fyrsta oljuleitingarumfarinum. Teigarnir, ið bjóðast skulu út, verða somuleiðis valdir við atliti at øðrum samfelagsáhugamálum so sum fiskivinnu og umhvørvi.

Martin Heinesen, leiðari á Oljufyrisitingini, sigur, at vit hava orsøk til at vera nøgd við tilmælini og vísir á, at henda nominatiónin er ein týðandi liður í fyrireikingunum til møguleikan at fara undir oljuleiting.

Hann sigur, at kortið gevur okkum eina hóming av, hvar møgulig leiting vil fara fram, men hetta er so ikki avgjørt enn.




*Kortið, sum vísir hvar oljufeløgini halda, at olja og gass møguliga finnast við Føroyar*

Sjálvur heldur hann annars, at tað er sera positivt, at tað eru øki uttan fyri tey sokallaðu umstriddu økini, sum oljufeløgini meta sum sera áhugaverd.

Martin Heinesen váttar, at umframt tey økini, sum oljufeløgini meta at vera mest áhugaverd, so hava tey eisini peikað út onnur øki, sum tey hava ymsar tankar um.

Vit spurdu hann, hvat hann gjørdist mest bilsin av, tá oljufeløgini peikaðu út teigar.

Tað er kanska hetta, at áhugaverdu økini liggja so spjødd.

**Oljufeløgini meina tað**

Vit hava eisini spurt Judith Neish, ráðgeva hjá føroysku oljumyndugleikunum, hvat hon heldur um „útspælið" hjá oljufeløgunum.

Hetta er sera áhugavert, ikki minst tí, at her ikki bert er talan um eitt øki men harafturímóti mong, sum hava áhuga.

Hon sigur seg annars ikki at vera bilsnan av til-mælunum, tí við tí vitan hon hevur til undirgrundina, so líkjast tilmælini tí, sum hon hevði roknað við.

Tað mest positiva við hesum er hetta, at oljufeløgini veruliga meina tað tey siga. Tey taka hetta í størsta álvara, og tilmælini hava veruliga nakað at byggja á.

**Løgmaður ovurfegin**

Løgmaður, sum umsitur olju- og undirgrundarmál er sera fegin um tilmælini frá oljufeløgunum.

-Eg eri ovurfegin um tann stóra áhugan, sum oljufeløgini vísa føroyska økinum. Hetta er so eisini ein

➤


## Tórshavnar Kvøld- & Ungdómsskúli

**Nýtt maritimt fyrireikingarskeið januar 1997**

Tilmelding á tlf. 17755
Undirvísingin byrjar 6. januar 1997, kl. 10.00 á Maskinmeistaraskúlanum
Skúlagongdin er um dagin og søkjast kann um útbúgvingarstuðul frá stuðulsstovninum

**Um undirtøkan verður nóg stór, byrjar royndarfyrireikandi undirvísing 9. og 10. flokkur í januar 1997 við hesum lærugreinum:**

Rokning/støddfrøði 9. flokkur — Roknskaparlæra/bókhald 9. flokkur
Alisfrøði 9. og 10. flokkur — Danskt 9. og 10. flokkur
Evnafrøði 9. og 10. flokkur — Týskt 9. og 10. flokkur

Tilmelding á tlf. 17755

**Telefontíðir:**
**Mánadag til hósdag kl. 15–20**
**Fríggjadag kl. 15–18**

## LÆRARI
## til MASKINMEISTARA-SKÚLAN

Søkt verður eftir lærara at seta í fast starv skjótast til ber. Undirvísingin fevnir serliga um lærugreinirnar maskinlæru, kølitøkni og hydraulik umframt onnur grundfak, so sum fysik, kemi og matematik.

Starvið er lønt eftir sáttmála millum lærarar á Maskinmeistaraskúlanum og Føroya Landsstýri.

Umsóknir við avriti av prógvum og øðrum upplýsingum skulu vera skúlanum í hendi í seinasta lagi fríggjadagin 3. jan. 1997.

**MASKINMEISTARASKÚLIN**
Undir Krákugjógv 5
100 Tórshavn

**Skrásetning Føroya**
hevur í dag skrásett niðanfyri standandi fráboðan

Skrásetingar-nr. P/f 203.
**P/f Føroya Termovirki, 100 Tórshavn**

**Viðtøkur broyttar:**
07.11.1996

**Kapitalur:**
Hækking við
kr. 200.000,00 til
kr. 500.000,00
Inngjaldingarháttur
Kr. 200.000,00 við grunshækking

**Nevnd:**
Farin frá sum formaður Andreas Ziska, Sundsvegur, 100 Tórshavn
Innkomin sum formaður Djoni Ziska, Sundsvegur, 100 Tórshavn

**Stjórn:**
Innkomin sum stjóri Andreas Ziska, Sundsvegur, 100 Tórshavn

**Tekningarreglur:**
Felagið verður bundið við undirskrift av stjóranum ella øllum nevndini í felag

**Endamál:**
Endamál felagsins er at reka vinnu innan framleiðslu og sølu av termorútum og øðrum umframt annað virki í hesum sambandi

**Skrásetning Føroya**
tann 5. desember 1996
**Kristin Balle**

---

greið ábending um at tað er ikki bert í einum stað á Føroyagrunninum, at tey vísa áhuga, men talan er um eitt sera stórt øki, sum hevur áhuga hjá oljufeløgunum.

Eg hevði vónað, at hetta fór at henda, og nú hava vit so fingið tað uppá skrift. Eg eri sera takksamur um, at henda vónin gekk út og fari at vóna, at hetta gevur okkum trygd uppá framtíðina.

Lat meg tó undirstrika, at hetta sigur einki um, at olja er her. Tað gevur tó eina týðandi ábending um Føroyar sum eitt áhugavert oljuøki.

**Halda fast um markið**

Vit spurdu løgmann, um hetta kemur okkum væl við í samráðingunum við bretar, nú umráði eru peikað út uttanfyri umstriddu økini.

Eg havi ikki so góðan hug at úttala meg um marknaviðurskiftini nú, men kann bert endurtaka, at tað er sera forvitnisligt at síggja, at tað eru nógv øki, sum eru áhugaverd, og sum ikki liggja við markið.

*-Nógvir tekjar liggja í umstriddu økjunum. Ert tú fegin um, at vit hava hildið fast um miðlinjuna?*

Vit skulu sjálvandi vinna tað, sum vit halda hoyrir Føroyum til, og tað halda vit fast um.

Løgmaður sigur annars, at einki nýtt er í samráðingunum við bretar. Teir eiga útspælið. Onki nýtt er í málinum, sum kann koma út alment nú. Okkurt bert t.d. at ein semja um markið aftur í ár verður jólatrøll.

---

# Fólk til Brennistøðina hjá IRF

Søkt verður við hesum eftir einum fólki til Brennistøðina hjá IRF at byrja 1/1-1997

**Arbeiðið umfatar:**
1. Viðlíkahaldsarbeiði
2. Innsavnan og skiljing av vandamiklum burturkasti
3. Annað fyrifallandi arbeiði innan IRF

**Krøv til umsøkjaran:**
Neyðugt er við handverkaraútbúgving umframt at viðkomandi er førur fyri at arbeiða sjálvstøðugt.

Skrivlig umsókn saman við prógvum skal vera okkum í hendi innan 23/12-1996.

Nærri fæst at vita um starvið við at ringja á tlf. 43343, Petur Jacob Johannesen

IRF
Postboks 39
520 Leirvík

# Maskinfólk til Brennistøðina hjá IRF

Søkt verður við hesum eftir einum maskinfólki til Brennistøðina hjá IRF at byrja 1/1-1997 til 31/12-1997

**Arbeiðið umfatar:**
1. At ganga vakt
2. Viðlíkahaldsarbeiði
3. Annað fyrifallandi arbeiði innan IRF

**Krøv til umsøkjaran:**
Neyðugt er við eini útbúgving, sum í minsta lagi svarar til gomlu maskinmeistaraútbúgvingina, umframt at viðkomandi er førur fyri at arbeiða sjálvstøðugt.

Skrivlig umsókn saman við prógvum skal vera okkum í hendi innan 23/12-1996.

Nærri fæst at vita um starvið við at ringja á tlf. 43343, Petur Jacob Johannesen

IRF
Postboks 39
520 Leirvík

# Fólk til Verkstaðið hjá IRF

Søkt verður við hesum eftir einum handverkara til Verkstaðið hjá IRF at byrja 1/1-1997

Arbeiðið umfatar alt vanligt smiðjuarbeiði.

Skrivlig umsókn saman við prógvum skal vera okkum í hendi innan 23/12-1996.

Nærri fæst at vita um starvið við at ringja á tlf. 43343, Sigurð Rasmussen

IRF
Postboks 39
520 Leirvík


Skal hann vera SVARTUR KJÓLIN?



Chiffong blondistoff
1.048,-
Stórt úrval av velour jakkum og svørtum síðum niðurdeilum
Jakki frá 628,-
Niðurdeilar frá 448,-
Kjóli úr blondustoffi
718,-
MARKER
Vit hava veitslukjólan – kjólan fyri sámuligan prís!
Stórt úrval av UNDIRSKJÚRTUM stuttum & longum hvítum ella svørtum
TILBOÐ
Veitslusokkar



Blanch Vouge
65,-

Skálabúðin
Dr. Jakobsensgøta 21, tlf. 15315





ADC-Heilsølan
Lamarvegur 14 - Tórshavn - Tlf. 15828 - Fax 15893
ARBEIÐSHANDSKAR
Til øll endamál – bæði á sjógvi og landi
LANDSINS STØRSTA ÚRVAL
frá eingangshandskum til ... handskar
BEINLEIÐIS FRÁ FRAMLEIÐARA
ADC



BILLUTIR
útvegast til
FLEST ALLAR
BILAR
Fa. BILLUTIR
Tlf. 21605 Fax. 21666








Best er



kurteisi og vinalag
rff